# Fundarfrásøgn

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Sendast til: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Jørgen Meitilberg (JM), Malan Marnersdóttir (MM) og Hans Pauli Joensen (HPJ) |
| Til staðar á fundinum vóru: | SíJ, JM, MM, HPJ og Randi Frederiksberg (RF) |
| Skrivað hevur: | RF |
| Fundartíð: | Týsdagur, 7. januar 2014, kl. 9 til 12 |
| Fundarstað: | SSS |

## Umrødd evni:

### 1. Fíggjarætlan (SíJ)

Kunnað varð um fíggjarætlanina 2014. Til næsta leiðslufund gera MM og HPJ uppskot til, hvussu konto 14 skal útgreinast á megindeildunum og JM fyri fyrisitingina.

### 2. Ársfrásøgn 2012 (SíJ)

Miðað verður ímóti at fáa ársfrásøgnina lidna í hesum mánaðinum.

### 3. Disponering av nýggjum hølum (SíJ)

Umrøtt varð, hvussu hølini í Bókbindaragøtu verða best gagnnýtt.

### 4. Upptøkan 2014 (JM)

Viðgjørt. Verður tikið upp aftur á næsta fundi.

### 5. Ymisk kunning og umrøða

#### a) Lestrarráðini (MM)

Valini av studentaumboðum til Stýrið, umboðum til Akademiska Ráðið og umboðum til lestrarráðini skulu samskipast. JM ger uppskot til nær valið kann vera at hava við á næsta leiðslufund (14/1). Eftir at valið er avgreitt, verður farið undir at fáa lestrarráðini virkin sum skjótast.

#### b) Deildarskrivstovulýsingarnar (MM)

Arbeiðið at gera lýsingar av virkisøkjum í nýggja bygnaðinum, sum enn mangla at verða endaliga góðkendar, verður tikið upp aftur í næstum.